## Ein Obama og annar

Í seinastuni hava leysasøgur gingið um, at amerikanski forsetin, Barack Obama, ætlaði sær at taka lut á einari ráðstevnu, sum altjóða olympiska nevndin, IOC, heldur í Keypmannahavn fyrst í oktober. Men nú hevur forsetin boðað fyrireikarunum frá, at hann hevur ikki tíð at fara til Keypmannahavnar. Men ein Obama verður kortini ráðstevnuni, tí kona forsetans, Michelle Obama, verður í amerikonsku sendinevndini. Tað er ikki av tilvild. Michelle Obama er ættað úr Chicago, sum hevur søkt um at sleppa at skipa fyri teimum olympisku leikunum í 2016.



## Heimsins størsti

Turksiki Sultan Kosen hevur nú fingið heitið sum heimsins størsti maður, og tað heitið fær hann staðfest í teirri næstu útgávuni av metbókini hjá Guinness. Tann 27 ára gamli Sultan Kosen er tveir metrar og 47 centimetrar høgur, og harafturat hevur hann størri hendur og størri føtur enn nakað annað menniskja. Frá handliðinum til ytsta snútan á longutong eru knappliga 28 centimetrar, og millum tað aftasta á hælinum og snútan á stórutá eru knappliga 37 centimetrar. Tað merkir við øðrum orðum, at Sultan Kosen brúkar skógvar nummar 60.

TALENT

*Óli Jaocbsen*
*olij@sosialurin.fo*



*Tað er eyðsýnt, at Celine er góð við djór*

Talent 2009:

# Nú kann atkvøðast fyri Celine

Í samband við fyrstu sendingina av Talent 09 greiddu við frá Celine Müller, sum er av føroyskari ætt og sum dugur sera væl at endurgeva djóraljóð.

Celine slapp víðari í fyrsta umfari, men fríggjakvøldið skal hon aftur royna seg. Tá er tað, at SMS-atkvøðurnar gerast avgerandi. Tá kunnu føroyingar gera sína ávirkan galdandi.

Um Celine skrivar heimasíðan hjá Danmarks Radio:

»Celine bor i Jyllinge med sin far, mor og lillebror, som alle er en stor støtte for hende. Hendes fars familie kommer fra Færøerne, og hendes bedstefar er tidligere borgmester i Gundsø kommune.

Celine går i 8. klasse, og hun interesserer sig meget for kreative aktiviteter - hun går både til billedkunst og tegner en del. Derudover svømmer hun også en masse i sin fritid. Hun er ofte sammen med vennerne, hvor de lytter til musik; bl.a. to bands The Dreams og Nightwish. Samtidig slapper Celine og vennerne ofte af med at se film, som bærer præg af action, gys og splat. Reglen er ingen tøsefilm. De er for kedelige!

Celine har fået meget opmærksomhed på skolen, efter hun var med i Talent 09. Især 9. klasse er meget nysgerrige efter at høre om, hvordan det er at være på tv.

Celine så selv Talent 2008 på DR1 sidste år, men havde ikke planlagt at stille op til Talent 09. Tilfældigt var hun ude og gå en tur med en veninde i Roskilde, hvor DR var i gang med at caste til Talent 09. Her opdagede de hurtigt, at Celine havde et specielt talent og sendte hende straks videre. Celine har siden, hun kan huske, kunnet sige de mange forskellige lyde. Hun ved, at hun har et specielt talent, og at hun skiller sig meget ud fra de andre deltagere.

Celine mener selv, at hun kan nå langt, da hun fortsat har en masse lyde i ærmerne - og der dukker fortsat nye op.«

Tað verður í hvussu er spennandi at síggja og hoyra Celine aftur. Vit ynskja henni góða eydnu og at føroyingar vilja stuðla henni til tess.

# Fimta symfoni hjá Shostakovich fyri fyrstu ferð

**Vikuskiftið 26. – 27. september fer Føroya Symfoniorkestur við Bernharði Wilkinson sum dirigenti at framføra fimtu symfoni eftir russika tónaskaldið Dimitri Shostakovic**

KONSERT

*Tíðindaskriv*



*Føroya Symfoniorkestur fer at framføra fimtu symfoni eftir Dimitri Shostakovic leygarkvøldið klokkan 20 í Løkshøll í Runavík. Sunnudagin klokkan 16 í Norðurlandahúsinum*



*Bernharður Wilkinson er stjórnar Føroya Symfoniorkestri*

Symfoni nr. 5 í d-moll er millum tey allarbest umtóktu verkini hjá Shostakovich yvirhøvur. Hann brúkti óvanliga stutta tíð at skriva hetta verkið – millum apríl og juli mánað 1937. Symfoniin varð fyrstu ferð framførd í november mánað sama árið í Leningrad av Filharmoniska orkestrinum har undir leiðslu av Yevgeny Mravinsky. Symfoniin fekk eina framúrskarandi móttøku longu á fyrstu framførsluni, og søgur siga, at lógvabrestirnir frá áhoyrarunum aftaná vardu umleið 40 minuttir – also næstan líka leingi sum symfoniin varir.

Og hendan móttøkan av hesum nýggja verkinum hjá Shostakovich var ógvuliga merkisverd, tí árini frammanundan hevði tónaskaldið verið fyri heilt óvanliga hvøssum atfinningum frá sovjettiska stýrinum. Tað var jú tað illa gitna Stalin-stýrið, sum ráddi í Sovjetsamveldinum tá. Serliga í 1936 aftan á framførslur av operu hansara Lady Macbeth of Mtsensk vóru atfinningarnar ímóti honum harðar. Myndugleikarnir skuldsettu hann fyri at skriva ov torføran og lítið fólkaligan tónleik. Myndugleikarnir kravdu, at sovjettisk listarfólk skaptu list, sum skuldi stimbra fólkið til at hálova kommunistiska stýrinum. List, sum var torfør, inntonkt og ring at skilja, hevði einki pláss í sovjettiska samfelagnum, tí fólkið vildi ikki hava hana, varð sagt. Shostakovich sjálvur var í stórum vanda fyri at enda millum tey ovurhonds mongu, sum í teimum árum vóru handtikin og ofta send í arbeiðslegur.

Soleiðis var støðan hjá Shostakovich í apríl 1937, tá hann fór undir arbeiðið uppá sína 5. Symfoni. Hann hevði bara nakrar mánaðir frammanundan steðgað venjingunum uppá sína 4. Symfoni, júst av hesum sama ótta. So hvussu skuldi hann sum listarmaður uppá ta eina síðuna "boyggja seg" fyri trýstinum frá kommunistiska flokkinum, samstundis sum hann uppá ta aðru síðina kundi standa frælsur sum tónaskald og kanska enntá speireka stýrið, uttan at hetta beinleiðis kundi ávísast?

Hetta vóru spurningar, sum vóru sera átroðkandi hjá Shostakovich helst øll árini undir kommunistiskum stýri í Sovjetsamveldinum. Og helst eru eisini fleiri tulkingar av, hvussu hann loysti hesar trupulleikar og hvørji svar hann fann.

Men við síni 5. Symfoni fann hann í hvussu so er eitt svar, sum bæði myndugleikar og vanligi áhoyrarin dámdu sera væl. Sum nevnt fekk symfoniin eina framúr góða móttøku longu til fyrstu framførsluna, og hon er framvegis í dag millum hansara best umtóktu verk. Myndugleikarnir funnu alt tað, teir høvdu brúk fyri, í nýggja verkinum, og tað sigst, at fólk – áhoyrarar í salinum – grótu undir framførsluni, tí tey kendu aftur tær almennu kenslurnar, sum tónaskaldið hevði lagt í tónleikin.

Synfoniin er í fýra satsum: Moderato - Allegretto - Largo - Allegro non troppo.